


*Ráðhúsplássið er ikki til at kenna aftur. Globus, tónleikapallur, básar og neonljós fylla plássið upp*

Veðurlagsráðstevnan COP15:

# Eitt livandi listasavn

**Veðurlagsbroytingarnar broyta ikki bara útsett øki kring knøttin. Danski høvuðsstaðurin hevur næstan broytt skap til eitt livandi listasavn, har hvørt verk á sín hátt varpar ljós á veðurlagsbroytingarnar**

**VEÐURLAGS-RÁÐSTEVNA**
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*
*Myndir. Rólant Waag Dam*

**Keypmannahavn:** Árstíðini so líkt er eisini danski høvuðsstaðurin prýddur við alskyns ljósketum og jólatrøum. Men jólaprýði er langt frá tað einasta, ið fríðkar Keypmannahavn í hesum døgum.

Veðurlagsráðstevnan, COP15, hevur við sær, at Keypmannahavn ikki er til at kenna aftur.

## Neonlitt Ráðhúspláss

Ráðhúsplássið, hjarta í danska høvuðsstaðnum, minnir mest av øllum um eitt slag av framtíðarbýi. Ein ovurhondsstórur globus stendur mitt á sjálvum Ráðhúsplássinum, upplýstur soleiðis, at hann er uppaftur sjónligari í myrkri enn í dagsljósi.

Globusurin er kringsettur av størri og smærri básum, hvør litríkari og umhvørvisvinarligari enn annar.

Men heilt jólaleyst og ókent er Ráðhúsplássið tó ikki heilt. Mitt undir 20 metrar høga globusinum stendur pylsuvognurin »Morfars pølser«, sum hevur góðar dagar í hesum døgum. Eina aðrastaðni stendur eisini eitt stórt jólatræ við jólaperum. Tað óvanliga við hesum træi er tó, at tað einans lýsir, tá onkur tímur at traðka á pedalurnar á súkklunum, sum standa knýttar til træið.

## Bjørnin sum bráðnar

Aðrastaðni í býnum hava tey valt at varpa ljós á veðurlagsráðstevnuna – og ikki minst á veðurlagsbroytingar – á annan hátt.

Á Nytorv, sum liggur á Strøgnum miðskeiðis millum Ráðhúsplássið og Højbro plads, stendur ein ísbjørn.

Henda ísbjørn var tilevnað úr ísi. Tað er enski listamaðurin Mark Coreth, sum er maðurin aftanfyri súmbolska listaverkið. Talan var upprunaliga um 11 tons av ísi, sum Mark Coreth fríggjadagin í farnu viku byrjaði at evna til.

Síðani hevur ísbjørnin staðið á Nytorv, har hon hevur fingið loyv at bráðna. Ísbjørnin skal ímynda menniskjaskaptu veðurlagsbroytingarnar, og hesin súmbolikkur varð uppaftur sjónligari við tað, at ein og hvør slapp at leggja sína heitu hond á listaverkið, sum av tí sama bráðnaði skjótari.

Mikudagin – fimm dagar eftir, at listaverkið varð avdúkað – var bert beinagrindin av ísbjørnini eftir á Nytorv.

Longur inni á Strøgnum – við Storkaspringvatnið á Amagertorv – stendur eitt listaverk, sum mong eisini seta saman við ís. Týska




*Ráðhúsplássið er kringsett av hesum neonlittu básum, sum eru karmur um alt frá framtíðar íbúðum til endurnýtsluverkstaðir*